Stuðul til stóru flokkarnar

ES-nevndin hevur nú skotið upp, at teir politisku flokkarnir í limalondunum skulu fáa figgjarligan stuðul. 62 milliónir krónur skulu nýtast til stuðulin, og endamálið er at menna demokratiið, sigur nevndin.

Ein treyt fyri at fáa stuðul er, at flokkarnir eru umboðaðir í fleiri londum, og tað hevur elvt til stóra misnøgd í Danmark, tí eftir hesum fáa Sosialistiski Fólkaflokkurin, Danski Fólkaflokkurin, Junirørslan og Fólkafylkingin ímóti ES ongan stuðul, sjálvt um øll fýra eru umboðað í ES-tinginum.

Mogens Camre, sum er ES-tinglimur fyri Danska Fólkaflokkin, heldur, at uppskotið hjá ES-nevndini hevur beint ta øvugtu ávirkanina enn ætlað, tí tað fer at skerja demokratiið heldur enn at menna tað, sigur hann. Einstakir politikarar úr teimum donsku flokkunum, sum eftir uppskotinum fáa stuðul, eru eisini ímóti uppskotinum.

Mistu pappírini

Det Norske Veritas tók í fjør siglingarloyvið frá 77 skipum, tí trygdarviðurskiftini vóru ikki í lagi. Árið fyri mistu 63 skip loyvið. Krøvini til trygdina eru herd í seinastuni og serliga eftir vanlukkuna við oljutangaskipinum "Prestige".

Tom Svensen, stjóri í Det Norske Veritas, sigur, at felagið leggur serliga stóran dent á góðskukrøvini og trygdina, samstundis sum fleiri reglur og krøv eru komin. Hann sigur, at felagið slakar ikki í nøkrum krøvum.

Det Norske Veritas hevur ongantíð klassað so stóran part av heimsins handilsflota sum í fjør. 16 prosent av øllum heimshandilsflotanum er klassaður í Det Norske Veritas, og av teimum skipunum, sum eru í gerð, eru 20,6 prosent klassað í felagnum.

Sleppa ikki leysir

Vinstrasinnaða uppreistrarrørslan í Kolombia, FARC, sýtir fyri at lata tríggjar amerikanarar leysar. Teir tríggir amerikanararnir hava sitið fangar hjá rørsluni í fjúrtan dagar, og FARC sigur, at menninir eru kríggsfangar. USA hevur umleið 500 hernaðarligar ráðgevar í Kolombia.

Teir tríggir menninir vóru saman við tveimum øðrum í einum lítlum flogfari, sum noyddist at neyðlenda í frumskóginum har suðuri í Kolombia tann 13. februar. FARC hevur boðað frá, at hinir báðir, ein amerikanari og ein kolombiumaður, eru deyðir.

Tað lítla Cessna-flogfarið var amerikanskt, og kolombiskir embætismenn hava sagt, at flogfarið var á njósnaraferð, tá tað noyddist at neyðlenda í frumskóginum. Seinastu dagarnar hava fleiri túsund stjórnarhermenn leitað eftir fangunum, men higartil uttan úrslit.

Øll vápnini vórðu oyðiløgd

Versonur Saddam Hussein, Hussein Kamel, skal hava greitt amerikansku fregnartænastuni CIA frá, at Irak hevur eingi hópoyðingarvápn. Tey seinastu vórðu oyðiløgd í 1995, skal hann hava sagt sambært amerikanska tíðarritinum Newsweek.

Hussein Kamel, sum var leiðari fyri iraksku vápnaverkætlanunum í tíggju ár, flýddi úr Irak til Jordan í 1995, men tá hann seinni fór heimaftur, varð hann myrdur. Meðan hann var í Jordan, var hann fleiri ferðir til avhoyringar hjá CIA. Ætlan hansara var, at hansara avdúkingar skuldu elva til, at verfaðirin varð frákoyrdur, men tá hann skilti, at USA ikki var sinnað at stuðla ætlanum hansara, fór hann aftur til Irak.

Hussein Kamel greiddi eisini táverandi vápnaeftirlitsmonnunum hjá ST frá tí, sum hann visti um irakska vápnaídnaðin. Sambært Newsweek hevur ST ongantíð almannakunngjørt innihaldið í hesum samrøðunum, tí ætlanin var at kanna, um Hussein Kamel hevði sagt satt.

UTTAN ÚR HEIMI

Norðurkorea spælir við vøddunum

Norðurkorea royndi fyrrakvøldið eina rakett. Í Suðurkorea ávarar forsetin grannan ímóti avleiðingunum

KOREA
Árni Joensen

Nýggi forsetin í Suðurkorea, Roh Moh-hyun, sigur, at Norðurkorea noyðist at velja ímillum kjarnorkuvápn og altjóða hjálp

Mynd: Reuters

Beint áðrenn tann nývaldi suðurkoreanski forsetin, Roh Moh-hyun, varð tikin í eið, kunngjørdi suðurkoreanska verjumálaráðið, at Norðurkorea hevði skotið eina rakett úr yvir Japanska Havið.

Tilburðurin fekk eisini ávirkan á setanarrøðuna hjá suðurkoreanska forsetanum. Tann 56 ára gamli løgfrøðingurin ávaraði Norðurkorea og segði, at landið noyðist at velja ímillum kjarnorkuvápn og altjóða hjálp. Forsetin nýtti tó høvi at gera vart við, at tað eru onnur viðurskifti, sum tey bæði grannalondini kunnu samstarva um.

Norðurkoreansku myndugleikarnir vóru skjótir at vátta, at landið hevði skotið eina rakett út yvir Japanska Havið. Ein talsmaður hjá myndugleikunum segði, at talan var um eina roynd, sum var neyðugt til tess at verja landsins trygd.

Hetta er ikki fyrstu ferð, at Norðurkorea órógvar sínar grannar við rakettroyndum. Fyri átta árum síðani skutu norðurkoreanar eina rakett tvørtur um Japan út í Kyrrahavið. CIA vil vera við, at Norðurkorea hevur eisini rakettir, sum kunnu røkka mál á amerikansku vesturstrondini

Saddam bjóðar Bush av - í sjónvarpsdysti

Irakski forsetin hevur lítlan hug at beina fyri teimum ólógligu rakettunum. Harafturímóti vil hann fegin í sjónvarpsdyst við sín amerikanska starvsfelaga

IRAK-KREPPAN
Árni Joensen

Í einari tríggjar tímar langari samrøðu við amerikanska sjónvarpið CBS segði Saddam Hussein, at hann kundi hugsað sær ein sjónvarpsdyst við George W. Bush, forseta.

- Eg eri til reiðar at fara í beinleiðis orðaskifti við tykkara forseta, segði Saddam Hussein. Hann legði afturat, at hann ætlar sær at siga tað, sum hann hevur at siga, og at amerikanski forsetin kann so gera tað sama.

ST-vápnaeftirlitsmenninir hava kravt, at Irak skal beina fyri rakettum av slagnum Al-Samoud, tí tær bera longri enn tær rakettirnar, sum Irak hevur loyvi at hava, men í sjónvarpssamrøðuni segði Saddam Hussein, at Irak hevur ongar rakettir, sum bera longri enn tað, sum loyvt er. Sambært vápnaeftirlitsmonnunum bera rakettirnar 183 kilometrar, men irakar siga, at í royndini hjá eftirlitsmonnunum høvdu rakettirnar onga løðing og onga stýriskipan. Tí vóru tær lættar og bóru langt.

Talsmaðurin hjá Hvítu Húsunum, Ari Fleischer, segði í gjár, at orðalagið hjá Saddam Hussein í samrøðuni við CBS vísti, at irakski leiðarin ætlar sær ikki at laga seg eftir ST-krøvunum. Tilboðið um ein sjónvarpsdyst millum teir báðar forsetarnar hevði hann onga viðmerking til.

ST hevur kortini ikki mist vónina um, at Irak fer at gera eftir kravinum um at beina fyri rakettunum. Serligi sendimaðurin hjá Hans Blix, Dmetrius Pericos, skal til Bagdad at tosa við stýrið har um eina tíðarætlan fyri, nær tann seinasta rakettin skal vera fyribeind.

Økt virksemi í Sørvági

Havnarlagið í Sørvági er farið at líkjast sær sjálvum aftur, fegnast borgarstjórin um. Virksemið er sera fjølbroytt, og har er altíð lív

VINNA
Edvard Joensen

Tað er lív aftur á havnarlagnum í Sørvági. Útróðurin er góður, og virksemi annars er vaksandi. Aftan fyri bátin, sum avreiðir, er smiðjan hjá Tavsen. Og við síðuna av henni er ísvirkið, sum fer í gongd aftur fyrsta dagin. Umframt er eisini móttøka og bæði saltfiskahús og laksavirki, har væl av fólki arbeiðir

Mynd: Edvard Joensen

Sørvági: Tað er nógv óg fjølbroytt virksemi á havnarlagnum í Sørvági. Eftir eitt deydligt tíðarskeið síðan kreppuna fyri 10 árum síðan, er rættiligt lív komið í aftur.

Tað var tann tíð, tá Sørvágur var millum tey fremru vinnuplássini í landinum. Men seinnu árini hevur verið í so linligt, heldur borgarstjóin í Sørvági, Eivin Jacobsen. Men nú fer at líkjast aftur, fegnast hann um.

Virksemið hevur verið ov einstáttað á havnarlagnum, heldur hann. Tað hevur verið flakavirkið. Og tá einki arbeiði var har, so var deytt.

Nú er alt øðrvísi. Er ikki arbeiði á flakavirkinum, so er tað laksurin. Síðani er landingarmiðstøðin, og nú kemur ísvirkið í gongd aftur. Eisini eru tænastuvinnur so som smiðja og handil. Umframt reiðaríið hjá Vesturvón, sum støðugt veksur. So alt í alt sær bara væl út í løtuni, heldur Eivin Jacobsen.

Nógv fólk

Tað arbeiða nógv fólk á havnarlagnum í Sørvági. Bara fiskavirkini munnu hava reiðiliga hálvthundrað fólk til abeiðis hvønn dag, metir borgrstjórin. Soleiðis helvt um helvt á laksa-virkinum hjá Sørvágs Laksi og á saltfiskavirkinum hjá P/F Maru. So er tað fiskamóttøkan hjá Vinjardi Joensen, sum ætlandi fer at lata upp í nýggjum hølum fyrsta dagin. Har munnu fara at arbeiða eini fimm - seks fólk, metir hann.

Eisini eru smiðjan hjá Tavsen og handilsvirkið hjá Niclasen. Umframt egningarskúrarnir. Oljugoymsla er eisini, og har koma tangabilarnir at fylla á. So alt í alt er bara heilt fitt av lívi á havnarlagnum í Sørvági.

Men tað krevur eisini nakað av kommununi, sigur Eivin Jacobsen. Umstøðurnar skulu alla tíðina vera at byggja nakað virksemi á.

Dekki á bryggjuni er ikki allastaðni í nóg góðum standi, og tað má hjálpast uppá. Serliga ytri partur krevur ábøtur heilt skjótt. Um tað verður stoypt ella asfalterað, er ikki endaliga avgjørt enn, sigur borgarstjórin.

Heimari á havnalagnum, heimi við laksavirkið, er tó bøtt um. Har er dekkið stoypt, eins og træbrúgvin eisini er umvælð.

Útróðurin

Útróðurin er vaksin munandi í Sørvági í seinastuni, og fleiri og fleiri hava biðið um egningarpláss.

–Tað var soleiðis, greiðir Eivin Jacobsen frá, at menn bóðu um loyvi at seta skúrar á sjálva bryggjuna. Men tað vildi bygdarráðið ikki. So okkurt annað mátti fáast til vega í staðin. Tað ber jú ikki bara til at nokta og einki eiga at bjóða ístaðin fyri, heldur hann.

Sørvágs Kommuna fór tí undir at seta tann heimara skúrin, sum teir siga, so frægt í stand, at verast kundi í honum, og har hevur so verið egnt í vetur. Hetta er tó ikki nøkur varandi loysn, og arbeitt verður eisini við øðrum møguleikum, sigur Eivin Jacobsen.

Hann greiðir frá, at ætlanir eru um at byggja nýggjar egningarskúrar. Men tað verður kortini ikki í hesum árnum, at pengar verða til tað, sigur hann. Eingin endalig avger er tikin um hvat og hvussu, men hugt er at ymsum møguleikum. Og eitt, sum teimum dámar væl, sigur Eivin Jacobsen, er tað, teir hava gjørt í Skopun. Har eru sera snøggir og arbeiðsligir egningarskúrar gjørdir omanvert bryggjuna. So hvør veit um ikki okkurt, sum fer at líkjast væl tí, verður at síggja í Sørvági um ikki so langa tíð, heldur hann.

Heilt við skerdan lut hava útróðrarbátarnir kortini ikki verið í Sørvági í ár. Til dømis hevur kommunan sett ein nýggjan krana á bryggjukantin, har bátarnir plaga at leggja upp, tá teir koma aftur av útróðri.

Norrøna tríggjar vikur seinkað

Nýggja Norræna verður latin Smyril Line tann 7. apríl, sum er tríggjar vikur seinni, enn higartil hevur verið ásett

FERÐAVINNA
Edvard Joensen

Tey, sum ætla sær páskatúr til Danmarkar í ár, sleppa kortini við nýggj Norrønu. Hon kemur til Havnar sama dag, sum hon eftir upprunaligu ferðaætlanini skal sigla aftur til Danmarkar.

Eftir væleydnaða royndartúrin hjá Nýggju Norrønu í seinatu viku, stendur nú greitt, at hon verður handað Smyril Line av Flender Werft í Lübeck tann 7. apríl. Hon fer beinleiðis til Føroya og verður í Havn tann 10. apríl, sum eisini er dagurin, tá hon eftir ferðaætlanini skal sigla til Danmarkar á síni fyrstu páskaferð.

Smyril Line sigur í tíðindaskrivi, at vikurnar eftir páskir, verður pláss gjørt í feðraætlnini fyri serstøkum framsýningartúrum í Føroyum, Hetlandi og Íslandi, har almenninguin fær høvi at vitja umborð og síggja nýggja skipið.

Norrøna var tekniskan royndartúr í Eystrasalti í seinastu viku. Tekniska útgerðin og maskinútgerðin vóðru royndu. Eini hálvtannaðhundrað fólk vóru við skipinum hendan túrin, sigur Smyril Line. Tá siglt varð við fullari ferð, gekk Norrøna 22 míl.